## Nevndin heldur fram



Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði aðalfund farna fríggjadag. Fyri vali stóðu Magni Arge og Meinhard Jacobsen, og vóru teir báðir afturvaldir. Nevndin er sostatt óbroytt, og hon hevur skipað seg við sama formansskapi: Jóhan Páll Joensen er formaður, og Kristoffur Laksá er næstformaður. Hinir nevndarlimirnir eru Bergur Poulsen, Jón Danielsen og Hákun Djurhuus.

## Løggildur grannskoðari



Jógvan Joensen varð tilnevndur løggildur grannskoðari tann 20. juni 2007. Jógvan er føddur í Vík tann 19. oktober 1967, men býr í Tórshavn. Eftir at hava lokið cand.merc.aud. prógv við Handilsháskúlan í Århus í 1994, hevur Jógvan Joensen starvast á P/F Grannskoðaravirkinum INPACT og hevur hann drúgvar royndir innan grannskoðan, roknskap, umframt ráðgeving innan skatta- og fíggjarviðurskifti. Í frítíðini telvar hann og er í løtuni formaður í Talvsambandi Føroya. Jógvan Joensen er giftur við Janet Matras Toftum og hava tey børnini Hjalti (14 ár), Flóvin (7 ár) og Lenu Mariu (½ ár).

# Barsilskipanin er ikki fyri øll

**- Eg hevði ikki torað at tiki orðið familjupolitikkur upp á tunguna, um eg var politikari í sitandi samgongu, sum hevur eina barsilsskipan við 8 milliónum í yvirskotið, samstundis sum familjur við næstan ongari inntøku onki fáa úr skipanini. Soleiðis sigur 28 ára gomul mamma úr Skopun við Sosialin.**

BARSILSSKIPANIN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Kristvør:*
*- Eg helt, at tað var ein minsta upphædd, sum øll fingu. Eg kundi ikki ímynda mær, at vit høvdu eina skipan, har gjaldið fór niður um 3000 krónur. Men eg tók feil, sigur Kristvør Kolden, sum fekk 1000 krónur um mánaðin frá barsilsskipanini*

Lítli Ísak verður eitt ár mánadagin, og mamma hansara, Kristvør Kolden, hevur verið heima hjá honum, síðani hann varð føddur. Hon og maðurin hava eisini tvær eldri døtur, sum tey hava fingið í pleygu úr Noregi.

Í flestu londum rundan um okkum rópa politikarar varskó, tí ov fá børn verða fødd. Men samanborið við grannalond okkara hava Føroyar ein sera høgan føðitíttleika. Føroyskar kvinnur seta í miðal 2,47 børn í verðina (Hagtøl frá 2006). Og sitandi landstýrið hevur fleiri ferðir lagt dent á týdningin av góðum umstøðum fyri barnafamiljur. Men ikki allar mammur merkja, at stríð teirra verður virðismett.

Sosialurin kundi í seinastu viku avdúka, at Barsilsskipanin síðsta ár hevði eitt avlop upp á leið 8 milliónir. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum og politikararnir kjakast um hvør skal umsita skipanina, tí sum er, fer alt yvirskotið í landskassan.

Fyri Kristvør Kolden í Skopun hevur tað tó lítlan týdning, um tað er landstýrismaðurin ella partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava endaligu ábyrgdina. Teir fyrstu seks mánaðarnar av lívinum hjá Ísaki fekk hon 1000 krónur um mánaðan frá barsilsskipanini. Og síðani hevur hon verið heima fyri null krónur um mánaðin. Hesa somu tíð hevur maður hennara verið í læru sum málari, og hevur tí ikki havt serliga stóra inntøku.

Unga mamman í Skopun greiðir Sosialinum frá sínari søgu.

- Á vári 2005 tóku vit tvær gentur, sum maður mín var pápabeiggi hjá, til okkum. Eg arbeiddi tá sum stuðul, men valdi at vera heima fyrstu tíðuna, so tær kundu fella væl til. Vit hava ikki fingið nakran peningaligan stuðul í hesum sambandi, tí tær komu frá skilfólkum úr øðrum landi. Eg var heldur ikki í ALS, tí eg ikki var arbeiðstøk. Og mitt í hesum gjørdist eg so upp á vegin.

- Maður mín var í læru, og av tí at hann var í skúla fekk hann bara lærlingaløn. Eg var sera illa fyri, og av neyð ringdi eg og teknaði meg í ALS. Tey vóru sera skeptisk um at loyva mær í skipanina, tí eg var í fimta mánaði. Men eg slapp uppí og fekk á leið 1200 krónur um mánaðin, til fýra vikur vóru eftir til barsil.

Tá lítli Ísak kom í verðina flutti hon yvir í barsilsskipanina og fekk nú á leið 1000 krónur um mánaðin.

### Gjalda inn, men fáa onki úr

28 ára gamla Kristvør Kolden í Skopun arbeiddi sum stuðul, áðrenn tey fingu døturnar, og maðurin hevur arbeitt hjá málarameistara, síðani tey fluttu heim til Føroya í 2001. Tey hava goldið inn í barilsskipanina og hava framvegis eitt langt lív framman fyri sær, har tey eisini fara at gjalda inn í skipanina. Tí heldur hon tað vera undarligt, at tað bara eru teir seinastu mánaðarnar, áðrenn barnið kemur í verðina, sum telja fyri útgjaldingina.

- Eg helt, at tað var ein minsta upphædd, sum øll fingu. Eg kundi ikki ímynda mær, at vit høvdu eina skipan, har gjaldið fór niður um 3000 krónur. Men eg tók feil. Tú kanst gjalda inn í skipanina eitt heilt lív, men um tú tekur ein lítlan steðg, beint áðrenn tú eigur, fært tú einki.

- Núverandi skipan noyðir kvinnur at fara biddaragongd til Almannastovuna. Men eg eri ikki áhuga í forsorgarhjálp. Og sjálvt um starvsfólkini á Almannastovuni eru vinarlig, so er tað eymýkjandi, at skula avleverað allar rokningar og so bara fáa nøkur oyrur ella slett onki afturfyri.

- Í Føroyum hjálpa vit ofta hvørjum øðrum uttanfyri almennu skipanina. Eg og maðurin hava til dømis búð bíliga, tí vit búgva í sama húsi sum mamma mín. Vit hava eisini klára okkum, tí bankin hevur verið so laðaligur. Men hví hava vit eina skipan, um hon ikki kann brúkast, spyr unga kvinnan í Skopun.